# Urguleikarafelagið aðalfund

**Urguleikarafelagið hevur aðalfund leygardagin 28/3 kl. 12.30 í Fuglafjarðar kirkju**

TÍÐINDASKRIV

Endamálið hjá Urguleikarafelagnum er at menna tónleikin í kirkjuni.

Vit hava hesi seinastu árini fingið nakrar útbúnar urguleikarar í starv í føroyskum kirkjum. Hesu størv eru kombinatiónsstørv, har urguleikarin er settur hálva tíð í kirkjuni og hálva tíð í musikkskúlanum.

Urguleikarafelagið metir, at í Føroyum hava vit tørv á eini 14 -18 slíkum størvum.

Tað er Føroya Musikkskúli og Hin føroyska Fólkakirkjan sum í felag gjalda størvini, tí vil ein skerjing av játtanini til Musikskúlan - gera tað ómøguligt, at vit fáa slík støv framyvir.

Vit vilja tí heita á løgtingslimir um ikki at skerja játtanina til Musikkskúlan!

Urguleikarafelagið hevur eitt gott samstarv við Musikkskúlan og fólkaskúlan.- Fyri okkum hevur tað stóran tónleikaligan týdning, at urguleikarin hevur kontakt við almenna tónleikalívið.

Kirkjuráðini hava verið sera trek til at lata seg førka. Nakrir urguleikarar sum hesi seinastu árini eru settir í starv í musikkskúlanum spæla ikki ella heilt sjáldan í kirkjum. Tey flestu kirkjuráð meina: At gongur tað - so gongur tað. Í tveimum kirkjum spælir ein elektronisk urga – hóast vit væl kundu fingið eina skipan í lag, har ein urguleikari fyri samsýning kundi spælt í hesum kirkjum.

Eitt mál, sum hevur verið nógv frammi í seinastuni eru morgunlestrarnir, sum Kringvarpi ikki longur sendir í útvarpinum kl 9.45.

Nógv mótmæltu avgerini hjá Kringvarpinum – eisini nógvir tinglimir.

Tað undrar okkum í Urguleikarafelagnum, at ongin sum varðar av okkara mentan tekur í egnan barm:

Mál og tónleikur broytist allatíðina, men onki er gjørt fyri at ajourføra kirkjuna málsliga og tónleikaliga. Vit hava okkara egna mál og egnu mentan – og kirkjan varð yvirtikin fyri fáum árum síðani. Men vit hava onga ætlan fyri, hvussu vit menna og fara fram málsliga og tónleikaliga á kirkjuliga økinum.

Sjálvandi er tað eitt megnar arbeiði, sum skal gerast - skulu vit umskriva nútíðina inn í ein sálm.

Spurningurin er um vit megna at seta okkum hetta arbeiðið fyri.

Vit vóna, at fólk møta fjølment til fundin í Fuglafirði.

Á skránni er m.a: Kunning frá formanninum, roknskapur og okkurt til matna.

# Stór undirtøka til studentadagin

TÍÐINDASKRIV

130 lesandi og onnur áhugað hava teknað seg til studentadagin hjá Norðuratlantsbólkinum, ið verður í dag. Høvuðsevnið á ráðstevnuni er, hvussu grønlendingar og føroyingar búsitandi í Danmark, kunnu gerast meira virknir í menningini av føroyska og grønlendska samfelagnum.

Studentaráðstevnan hja Norðuratlantsbólkinum verður í dag kl. 13-17 í Landstingssalinum á Christiansborg. Politikarar úr Føroyum, Grønlandi og Danmark eru bjóðaðir at kjakast um hvussu tey trý londini best gagnnýta tað tilfeingið, sum grønlendingar og føroyingar í Danmark eru.

## Bólkakjak við úrslitum

Í ár tekur ráðstevnan støði í kanningunum um grønlendingar og føroyingar, sum Norðuratlantsbólkurin hevur latið gjørt. Í endanum av ráðstevnuni verður bólkakjak við øllum luttakarum, við høvuðsspurninginum hvussu føroyingar og grønlendingar búsitandi í Danmark kunnu fáast heimaftur. Undir bólkakjakinum er møguleiki fyri tøttum samrøðum millum framløguhaldararnar og luttakararnar.

“Eg gleði meg at hoyra sjónarmiðini hjá teimum lesandi, til tær kanningar ið vit hava gjørt um føroyingar og grønlendingar í Danmark, og hoyra hvat tey meta skal til, fyri at fáa tey, at luttaka í menningini av tí føroyska og grønlendska samfelagnum” sigur Høgni Hoydal

## Persónlig sambond við Norðuratlantshavið

Ì fyrsta parti av ráðstevnuni, fer Fíggjarmálaráðharrin Lars Løkke Rasmussen og fólkatingslimirnir Julie Rademacher og Line Barfod at tosa um evnið frá einum donskum vinkli. Lars Løkke Rasmussen, sum væntandi verður næsti forsætisráðharri í Danmark, er føroyskt giftur, og Julie Rademacher frá Socialdemokratunum hevur grønlendsk ættarbond. Tað er sostatt lagt upp til, at kjakið við teir donsku politikkararnar verður til stórt gagn og áhuga hjá teimum lesandi.

I seinna parti av ráðstevnuni, luttaka føroyskir og grønlendskir politikararnir og vinnulívsfólk. Tá fara borgarstjórarnir í Tòrshavn og Sermersooq, Heðin Mortensen og Assi Chemnitz Narup at geva teirra boð uppá hvat skal til fyri at fáa tey ungu heim. Harumframt fara stjórarnir, Svend Hardenberg frá Nuuk og Christian Nagata frá Tórshavn, sum báðir sjálvir hava verið undir útbúgvin í Danmark, at greiða frá teirra persónligu royndum við at flyta heim eftir lokna útbúgving. Úrslitið frá bólkakjakinum verður samlað og lagt á heimasíðuna hjá Norðuratlantsbólkinum www.dnag.dk.

Kanningarnar hjá Norðuratlantsbólkinum er at finna her: www.dnag.dk.

